Viðmerking:

# Eitt sera løgið orðaskifti

Eitt sera løgið, men tó áhugavert orðaskifti hevur tikið seg upp, meira ella minni sum ein fylgja av einari bersøgnari blaðsamrøðu, sum Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður hevði við Sosialin. Torbjørn førdi m.a. fram í blaðnum, at hann umhugsar støðuna, um hann vil aftur í tingið, tí hann hevur kent seg sum atkvøðuneyt hjá landsstýrinum, sum hann upplivir meira sum eitt diktatur heldur enn ein liður í fólkaræðisligu skipanini við tríbýtta valdinum.

Fyrst má eg siga, at neyvan hevur ein løgtingsmaður nakrantíð áður verið so bersøgin um egnu politisku ómegd sum samgongumaður, sum Torbjørn er, men samstundis er samrøðan eisini ein ótrúliga hørð atfinning mótvegis landsstýrinum fyri eina diktatoriska framferð mótvegis egnu samgongumonnum.

Harnæst hevur Torbjørn við síni samrøðu givið okkara politisku skipan nøkur hættislig høgg, og vandi er fyri, at borgarar fara at missa álitið á løgtingið. Og tað er í sær sjálvum vandamikið, tí hvat er alternativið? So í so máta, vóru orðini kanska betur ósøgd og áttu heldur at verið tikin upp í einari viðgerð í samgonguni, sum eisini Torbjørn er partur av.

Tað hevði eisini verið gagnligt at havt eitt orðaskifti millum flokkarnar á tingi, um hvørjar siðvenjur skulu brúkast í samband við nýggju stýrisskipanarlógina.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður hevur síðan gjørt nakrar viðmerkingar til Torbjørn, har hann m.a. sigur, at tingið er ov veikt mótvegis landsstýrinum, og at tingið ikki brúkar teir møguleikar, sum liggja í stýrisskipanarlógini. Síðan nevnir hann eisini , at nú flokkarnir fáa floksskrivara, so verður alt betur. Floksskrivarin fer ikki at loysa slíkar trupulleikar, tí trupulleikin er reint politiskur.

Orsakað eg sigi tað, men eg haldi, at Høgni er farin púra skeivur av Torbirni. Um so er, at løgtingið er veikt, so er tað samgongan í tinginum, sum er veik. Og er hon veik, so er tað ein trupulleiki hjá samgonguni, sum einki hevur við tingarbeiðið annars at gera. Tá Torbjørn sigur, at hann ikki finnur seg í bert at vera atkvøðuneyt, so liggur tað í hesum, at hann kennir seg at vera uttan fyri ta politisku prosessina. Hann er sum løgtingsmaður ikki inndrigin í eina politiska viðgerð av einum máli, sum er undir fyrireiking. Hann hevur snøgt sagt ikki havt møguelikan at siga sína hugsan, fyrr enn atkvøðuknappurin skal aktiverast. So alt í alt ein kritikkur av arbeiðslagnum i samgonguni. Sjálvandi skal man ikki vænta, at ein løgtingsmaður í samgongu verður ídnastur at leggja misálit fram, so hetta er ein møguleiki, sum er rættiliga fjarur fyri flestu samgongutingmenn.

Eisini hevur løgmaður lagt eina ótrúliga toleranta linju fyri, hvat hann heldur, at ein landsstýrismaður kann loyva sær.

Síðan hevur Høgni eisini nakrar hugleiðingar um, at fólk ikki hava álit á politisku skipanina, og at bert ein loysn er til tann trupulleikan, og tað er sjálvsagt fullveldi. „Tá vit fáa fullveldið, so verður alt annað gott“. Eg meini tað__

Løgmaður hevur eisini havt sínar viðmerkingar, har hann m.a. geiðir frá, at øll uppskot verða send samgonguflokkunum í góðari tíð fyri framløgu til ummælis. Tað er í sær sjálvum skilagott, men um flokkarnir ikki viðgera málini, so er tað púrast burturspilt orka. Men fyri tann skyld er tað ikki nakað í vegin við Føroya Løgtingi og heldur ikki við andstøðuni.

Taka vit dagsaktuelle málið viðvíkjandi pensjónunum, so er tað eingin umbering fyri tingmenn, at uppskotið, sum kom frá Helenu Dam á Neystabø ikki var nóg gott. Tingmenn ábyrgdast ikki nøkrum landsstýrismanni ei heldur løgmanni, men standa bert til ábyrgd fyri sínum veljarum og egnari samvitsku. So undanførslurnar hjá tjóðveldismonnunum, um at teir kendu seg noyddar at atkvøða, hon dugur snøgt sagt ikki. Tí tað er ikki ein skipan, sum er veik, men tað eru nakrir løgtingsmenn, sum ikki liva upp til sína uppgávu sum parlamentarikkarar.

So nú samgongan er farin alment út við teimum skitnu klæðunum, so er bert at vóna, at teir finna staðið, har trupulleikin veruliga liggur. Og tað er so avgjørt eingin grund til, og harafturat beinleiðis skaðiligt, at halda, at Føroya Løgting ikki er nóg sterkt.

Føroya Løgting er sambært stýrisskipanina sterkt, men tó verða tað teir einstøku tingmenninir, sum gera av, hvussu nógv styrki liggur í løgtinginum, og hvussu nógv styrki liggur hjá landsstýrinum. Og allir tingmenn úr andstøðu vilja sjálvandi hava eitt so sterkt løgting, sum gjørligt, meðan teir sum lata seg diktera av landsstýrinum, teir sita allir í samgongu.



Míni ráð skulu tí verða, at tit ikki gera hetta til eitt mál, sum tað als ikki er, men heldur royna at loysa innanhýsistrupulleikarnir, sum tit sita við. Tit eiga orsøkina til trupulleikan, og tit eiga loysnirnar til trupulleikan. Og trupulleikan sita tit við í fanginunum.

**Jóannes Eidesgaard**
**løgtingsmaður**



## Dálkandi løgur

Útvarp Føroya tosar dagliga um at melda Landssjúkrahúsið fyri at hava latið dálkandi løg út á sjógv, samstundis sum Útvarp Føroya í líka so langa tíð hevur latið dálkandi løg út í luftina.

**Johan í Kollafirði**

# Skilir nakar Jóannes Eidesgaard?

Ikki hissini remingar rundan um Jóannes Eidesgaard fyri tíðina. Politiskir mótstøðumenn misskilja hann, viðhaldsmenn somuleiðis, blaðmenn og tíðindamenn eisini, flokkar og fjølmiðlar, alt og øll misskilja tey Jóannes Eidesgaard.

Á tingi skiltu vit ikki, hví hann stakk av, tá ið hann kundi havt bjargað pensjonistunum 25 mió.kr.

Heldur ikki skiltu vit, hví hann ikki vildi vera við til at bjarga Suðuroyar Sjúkrahúsi 1,8 mió.kr.

Og innanfloks stendur enn verri til. Har skilir eingin nakað sum helst.

Ónøgdin, sum har hevur leikað á, kom fram fyri almenningin um vikuskiftið, og givið er, at vátt hevur verið í reiðrinum longri tíð. Ósemjan er húsvill, og fær ikki verið innanfloks longur.

Jóannes Eidesgaard fekk turt upp á frá fyrrverandi flokskrivara sínum, sum í nýtum orðum segði honum, at hvørki høvd ella hali var á politisku leiðslu floksins.

Formaðurin hevur verið gyrdur í brókum síðani tá, og valdi fyri fyrst alment at takka fyri avbukingina, og lovaði bót og betring.

Kortini nýtti hann høvið til at siga frá, at tað eina mest vóru útvarp og sjónvarp, har hann annars altíð hevur verið fast inventar, sum áttu ábyrgdina av, at Javnaðarflokkurin og formaður hansara ikki fingu boðskapin frá sær.

Afturat formanninum í Vága valfelag hava vit sæð fleiri aðrar floksmenn skriva, at heldur ikki teir skiltu serliga nógv av politikki floksins.

Vit sóu tað undan Skopunarfundinum, har fleiri sóknaðust eftir einari greiðari støðu, serliga á fullveldisøkinum, men vit hava ikki sæð hana enn.

Uttanfyri flokkin hava vit verið enn fleiri, ið ikki hava skilt mál og mið Javnaðarfloksins, og um dagarnar løgdust so eisini blaðmenninir á bæði Sosialinum og Dimmalætting afturat hesum skarað, ið ikki fatar ein pinn av fullveldispolitikki Javnaðarfloksins.

Kortini so sigur Jóannes Eidesgaard, at tað serliga er fullveldismálið, sum er farið avstað við tíðini hjá sær, og at tí hevur so mangt annað ligið á láni.

Hetta setur hetta okkum enn fleiri spurningar, enn tað gevur svar, tí tað er jú júst á hesum økinum, ið Jóannes Eidesgaard nýtir alla sína orku, at Javnaðarflokkurin ikki serliga greiður.

Seinast hann var í Fimmaranum, segði hann seg vera mest einsamalla mann á Kristjansborg, og ongantíð segði hann seg hava verið inni á gólvinum hjá floksfeløgum sínum har niðri.

### Løgið kortini

Vit spyrja okkum sjálvi, hví Jóannes Eidesgaard so hivaði Óla Stavad, sum hann ongantíð hevur verið inni á gólvinum hjá, líka til Skopunar, at kyrra føroyskar javnaðarmenn, sum standa sum ryssur yvir deyðum fylum, slotandi og spyrjandi eftir politikki floksins.

Ein annar maður, sum Jóannes Eidesgaard heldur ikki hevði verið inni á gólvinum hjá, Pól Nyrup Rasmussen, segði almenninginum á landsfundi danska Javnaðarfloksins, at var tað nakar, sum stóð honum undir lið í donskum politikki, og vice versa, so var tað júst ein við navni nevndur - Jóannes Eidesgaard.

### Eg meini tað

Stríð og strev er óivað innanfyri allar flokkar á tingi, men nú hevur so Javnaðarflokkurin valt at tveita Jóannes Eidesgaard fyri úlvarnar. Týðiligt er, at tá ið Javnaðarflokkurin skal vera konstruktivur, so fær hann trupulleikar, og tí er panikkur komin í Jóannes Eidesgaard.

Tílíkur ótryggleiki, soleiðis sum vit sígja hann, er alt annað enn serliga heppin upp undir løtuna, hvar vit føroyingar - saman við Javnaðarflokkinum - fara at leggja seinastu hond á fullveldisætlanina, áðrenn vit fara til Danmarkar at samráðast um hana.

Greitt er, at vánalig leiðsla skapar mótsetningar innanhýsis. Tað er serliga nakað, sum kann henda, tá tú situr í samgongu, meðan tað er meira ókent og tí enn álvarsamari, tá ið tað hendir í flokki, sum situr í andstøðu.



Hvat klakt verður í váta reiðri Javnaðarfloksins vita vit lítið um í løtuni, men gott og gagnligt hevði tað verið við eini sjálvrannsakan, soleiðis at vit vita, hvar vit hava hvønn annan.

Tað er ikki heppið, at øll misskilja ein av floksformonnunum á tingi. Samgonga og andstøða, mótstøðumenn og viðhaldsmenn, blaðmenn og tíðindamenn, flokkar og fjølmiðlar, øll hava trupult við at skilja Jóannes Eidesgaard.

Tað átti Javnaðarflokkurin at gjørt nakað við.

**Hergeir Nielsen**

2 ´arin

Leygardagur 15. januar 2000

## Toleransa er boðskapurin

Fýra síður um William Heinesen og tiltøk á 100 ára degnum




# Úrmælingurin úr Usbekistan



Nicolaos Kapnas hevur strokið violinstreingjum, síðani hann var 9 ára gamal. Hann hevur fingið undirvísing í Usbekistan, Grikkalandi og Belgia, og nú er hann musikklærari í Føroyum.

*síða 18 og 19*



*Tim Severin:*

## Veljið tykkara egnu loysnir

*síða 16 og 17*